Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Liljan Weihe, løgtingskvinna

Svarari: Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum

Evni: Børn og ung, sum føroyskir myndugleikar senda til Danmarkar

Spurningar:

1. Hvat eftirlit hava føroyskir myndugleikar við stovnum og skúlum, sum føroysk børn og ung verða send á í Danmark?
2. Hvussu langt er arbeiðið at dagføra barnaverndarlógina komið?
3. Hvussu langt er arbeiðið at gera eina landsætlan til barnaverndarmál komið?
4. Hvussu ætlar landsstýrismaðurin at tryggja, at vit taka ábyrgd og sjálvi taka okkum av hesum børnunum og ungu?

Viðmerkingar:
Á hvørjum ári vera føroysk børn og ung send til Danmarkar á stovn av føroyskum myndugleikum, tí vit ikki hava nøktandi tilboð til tey í Føroyum. Hetta eru børn, sum hava stórar og samansettar avbjóðingar.

Heldur enn at lofta teimum og hjálpa teimum í teirra heimliga umhvørvi, verða tey send til eitt fremmant land við einum fremmandum máli og fremmandari mentan. Langt burturi frá familju, næstringum og øllum tí, sum er kent.

Nú er komið fram í poddvarpsrøðini *Kostskúlabørnini* hjá Frihedsbrevet.fo, at børn, sum føroyskir myndugleikar hava sent av landinum, hava verið fyri stórum ágangi á skúlum, sum børnini eru send á. Talan er um grova happing, kynsliga misnýtslu, rúsevnamisnýtslu og annað ringt.

Hetta kann sjálvsagt ikki góðtakast. Og má sjálvandi steðgast, um hetta framvegis fer fram. Tað eru føroyskir myndugleikar, sum senda børnini av landinum, men spurningurin er, um føroyskir myndugleikar kunnu hava eftirlit við, at børnini hava tað gott og trívast, har tey eru. Og hvør hevur ábyrgdina.

Í samgonguskjalinum stendur, at ”Barnaverndarlógin skal dagførast, og arbeiðsviðurskiftini hjá fosturfamiljum skulu betrast. Ein landsætlan til barnaverndarmál skal gerast, og fyribyrgjandi arbeiði kring familjuna skal styrkjast. Styrkjast skal eisini um samstarvið við Barnaverndarstovuna, og barnabústovnar skulu byggjast.”

Tað er eftirhondini um at vera 50 ár síðani, at vit tóku ábyrgd av almannaøkinum, men framvegis verða børn og ung send av landinum, tí vit siga okkum ikki hava umstøður til at taka okkum av teimum. Við vón um, at vit sjálvi taka ábyrgd og taka okkum av okkara egnu borgarum, verður hesin fyrispurningur settur landsstýrismanninum.

Á Løgtingi, 8. januar 2024

Liljan Weihe